# Barnlek 2023 er komið at enda

So var størsta norðurlendska barnadansistvenan, BARNLEK, av á hesum sinni, og føroyska ferðaliðið hjá Sláið Ring er komið heim ríka við upplivingum og minnum.

Í ár hevur BARNLEK 40 ára føðingardag, so temað var *kalas*, sum merkir *veitsla* – og tað var sanniliga ein veitsla. Fólkadraktirnar frá ymsu luttakandi norðurlondunum lýstu býin upp við sínum føgru litum, gøturnar lívgaðust av vøkrum og stuttligum tónum frá tónleikarunum, og huglagið var heilt serligt, tá luttakararnir dansaðu runt á torgum, ellisheimum og aðrastaðni.

Vit hava havt fleiri framsýningar av føroyskum dansi og dansispølum, summar í føroyskum klæðum. Vit eru errin av okkara børnum og ungu, sum stóðu fyri hesum. Dansararnir vóru í aldrinum 3-17 ár, og øll vandu dúgliga, og livdu upp til ábyrgdina sum framførsla hevur við sær. Tey dugdu stev, kvóðu væl við og høvdu gott samband hvør við annan, meðan dansað var. Heilt fitt av fólki var savnað at hyggja eftir framførslunum, hóast veðrið ikki var við okkum, og foreldur stóðu við vátum eygum og myndatóli í hond.

Harumframt hava vit eisini havt dansiverkstovur, har vit lærdu hinar luttakarar føroyskan dans og dansispøl. Serliga fullu fólk fyri *Ole Morske*, sum er ein skemtilig vísa, har vanliga verður hoppað í stevi í niðurlagnum. Men eisini bandadansur, edilingur, slippidansur og seeman vóru væl umtókt – og ikki minst vanligi føroyski dansurin, tá ein góður skipari treiv í eitt kvæði. Dansað var í eini stórari ítróttarhøll, og tá kann vera trupult at fáa kvæðini at runga – men tað gekk heilt væl tá allir 130 føroyngar kvóðu – eisini hóast meira enn helmingurin var børn.

Svenska Folkdansringen hevur fyrireikað stevnuna í 7 ár, og alt hevur gingið uppá stás. Útferðirnar hava verið framúr, tiltøkini hava verið stuttlig, og maturin góður. Luttakandi londini kýttu seg fyri at hava læruríkar og gevandi sangverkstovur, spæliverkstovur og sangverkstovur, og vaktir og ábyrgdarfólk vóru røsk og fitt at hava við at gera.

Eitt sum eydnaðist serstakliga væl var *tilsammans i Norden*, har teir eldru luttakararnir á stevnuni (12-16 ár) hittust at venja framførslu til endahátíðarhaldið. Tey vandu saman tvær ferðir um dagin. Hetta gav teimum møguleika at fáa tættari samband við aðrar dansarar í sama aldursbólki, og knýta vinabond tvørtur um landamørk. Væl var vant. Endaligu framførslurnar vóru stuttligar at síggja – skjúrtini, sum annars eru so tung – fuku, sum gentur og dreingir dansaðu við fullari ferð eftir gólvinum.

Hóast hinir norðurlendsku fólkadansirnir liggja nakað fjart frá tí føroyska, vóru nógv føroysk børn at síggja á dansigólvinum alla tíðina. Og tað var eisini heilt fitt av fólki tá vit lærdu hini at dansa føroyskan dans og dansispøl. ”Hetta var mega stuttligt, eg gleði meg til vit fara til Finlands um trý ár!”, segði ein smádrongur, tá vit sótu í bussinum ávegis til Danmarkar. Og so legði hann afturat:” Eg fari eisini við tá eg verði 16 ár!” Hetta ber boð um at børnini hava hugnað sær og havt eina góða ferð.

Nú er stafettpinnurin handaður finnum, sum skulu hýsa Barnlek 2026, har vit gleða okkum at hitta nýggjar og gamlar vinir.

Næsta ár luttekur Sláið Ring á NORDLEK í Arendal, Noregi, tá ungir og vaksnir dansarar hittast til norðurlendskan fólkadans og samveru.

*Meira kunning og myndir frá Barnlek 2023 eru á www.instagram.com/slaidring*

**Hvørjar vóru 3 stuttligastu upplivingarnar á Barnlek 2023?**



**Navn:** Janus Egholm

**Aldur:** 9 ár
**Bústaður:** Sandur

1. At traðka upp, tí tað vóru so nógv fólk sum hugdu. Tað gekk væl.
2. At man slapp at vera so leingi uppi og dansa. Tað er ilt at siga hvør dansur var stuttligast, men teir hjá Grønlandi vóru serliga stuttligir
3. At sleppa at vera saman við so nógvum fólkum úr fleiri londum, og at tað var so nógv fólk sum tíma at dansa.



**Navn:** Bjørg Edvardsdóttir
**Aldur:** 11 ár
**Bústaður:** Kvívík

Tað var stuttligt at læra nýggjar dansir, og at læra onnur føroyskar dansir. Tað var hugnaligt at dansa við øðrum londum.  Tað var eisini stuttligt og spennandi á útferðini, tí vit lærdu uppá ein stuttligan máta. Eg haldi at tað var mega hugnaligt at koyra buss, sjálvt um tað tók so leingi, tí vit sungu og snakkaðu, og tað var bara hugnaligt. Eg helt at tað var mega stuttligt at vera á Barnlek fyri fyrstu ferð. Eg vil gjarna fara á Barnlek 2026.